# Fundarrøð í Berøa, Saltangará

## Kristus í skriftunum

TÍÐINDASKRIV
*við Poul Jóhan Djurhuus*



Tá Jesus fylgdist við tveimum lærisveinum sínum eftir vegnum til Emmaus, aftaná uppreisnina, lesa vit, at Jesus talaði til teirra um alt tað, sum stóð skrivað um hann í øllum skriftunum. Hetta lesa vit um í Luk.24,27v. Hetta er óivað besti bíblutími sum nakrantíð hevur verið hildin um Kristusprofetiini í gamla testamenti, tí her var tað Meistarin sjálvur, sum undirvísti.

Veruleikin er tann, at í øllum skriftunum í gamla testamenti, líka frá Mósebókunum, ígjøgnum allar profetarnar og allar sálmarnar síggja vit endurloysaran Kristus sum ein gjøgnumgangandi reyðan tráð. Tað var hetta evni, sum fremmandamaðurin á Emmausvegnum, tí teir vitstu ikki við tað sama hvør hann var, talaði til teir um.

Hann talaði so væl og so spennandi, at hjørtu teirra brendu, tá teir sóu Hann í Skriftunum, tí hetta var einki minni enn ein sensatión fyri teimum, tí júst hetta var eitt av kardinalprógvunum fyri, at tann Jesus, sum teir høvdu fylgst við í trý ár, ikki einans var Jesus úr Nazaret, men var tann, sum hann segði seg at vera - Messias.

Nú hevur tú møguleikan at hoyra um hetta sera áhugaverda evni. Ígjøgnum oktobermánaða verða møtir hildin í Berøa í Saltangará, har evnið verður "Kristus í Skriftunum." Møtini vera hvørt mikukvøld kl.19.30 og hvørt sunnukvøld kl.18.00 Tað verða níggju møtir í alt, har ymiskir talarar luttaka hvør sítt kvøldið, og koma teir at lýsa evni frá hvør sínum parti av skriftini, baði í gamla- og nýggja testamenti.

### Talarar

Símun í Túni og Páll Poulsen koma ávíkivist at tosa um Kristus í persónum og myndum í Mósebókunum. Karl Jóhan Nielsen kemur at tosa um Kristus í Rutts bók. Zacharias Zachariassen um Kristus í Sálmunum. Poul Jóhan Djurhuus um líðingar Kristusar í Sálmi 22. Og Símun Pætur á Torkilsheyggi kemur at tosa um Kristus í Esaiasar bók.

Vit fara eisini at hoyra um hvussu Kristus verður lýstur í nýggja testamenti. Hetta fara Svenning av Lofti, Poul Færø og Símun Absalonssen at røða um á trimum teimum seinastu møtunum í fundarøðini. Teir fara at vísa okkum hvussu Kristus verður lýstur í teimum fíra evangeliinum, í brøvunum og í Opinberingini.

Kom og verð við til hesi møtir og tú kemur at uppliva Kristus av nýggjum í skriftunum og tann sama eldin í hjartanum sum lærisveinarnir gjørdu, tá teir, á veg til Emmaus, sóu Kristus í Skriftini.

Bjóðað verður til drekkamunn eftir møtið hvørt mikukvøld, og har verður høvið at hava eina persónliga samtalu um evni, um so er at tú ynskir tað.

Aftaná seinasta møti, sum verður sunnukvøldið 31. oktober, er ætlanin at hava eina bóka-café í kjallarinum, har Logos bókhandil í Havn kemur at stilla bøkur fram til sølu.

Um tú ynskir at vita meiri um møtini, ert tú vælkomin at ringja 448314 ella 228314 ella GJARANES@POST.OLIVANT.FO


# HALDIÐ SOSIALIN

450,- um ársfjórðingin
- sparið 395,-
í mun til leysasølu




600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________________

Bústaður: ____________________

Postnr.: ____________________

Bygd/býur: ____________________

Telefon nr.: ____________________

Undirskrift: ____________________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið

**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO




# Hallið á fíggjarlógini er í lagi

**Jenis av Rana, formaður í Miðflokkinum sigur, at hallið á fíggjarlógaruppskotinum er í lagi. Sambært Jenisi av Rana er fíggjarlógaruppskotið eitt framhald av politikkinum hjá fyrrverandi samgongu**

FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Formaðurin í Miðflokkinum, Jenis av Rana, heldur, at fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum er eitt framhald av politikkinum hjá undanfarnu samgongu*
*savnsmynd*

Formaðurin í Miðflokkinum heldur, at fyri Miðflokkin er fíggjarlógaruppskotið sum heild gott, tí talan er um framhald av politikkinum hjá undanfarnu samgongu, sum Miðflokkurin jú var partur av. Jenis av Rana vil enntá verða við, at samgongan hevur "adopterað" fíggjarlógaruppskotið hjá farnu samgongu.

Viðvíkjandi hallinum á fíggjarlógaruppskotinum sigur Jenis av Rana, at tað er í lagi. – Tað er í lagi í hesum tíðum at hava eitt lítið hall, tí annars hevði tað gingið út yvir vanliga borgaran, sigur hann.

### Vit høvdu planlagt allar nýggju íløgurnar

Jenis av Rana sigur, at hann heldur tað verða øgiliga lítið nýtt at síggja í fíggjarlógaruppskotinum. – Vit høvdu planlagt alt við nýggju íløgunum, bæði viðvíkjandi tunnli í Suðuroynni, og viðvíkjandi miðnámsskúlanum í Suðuroynni, sigur hann.

– Eg dugi heldur ikki at skilja, hví man skal leggja avgjald á sodavatn, ið er ein føroysk framleiðsla, heldur enn at leggja tað á útlendskt søtmeti, ið verður innflutt til landið. Hetta kann kosta arbeiðspláss her á landi, og tað hevði tað ikki gjørt, um tað var umvent, sigur Jenis av Rana.

– Teir hava eisini sett í fíggjarlógaruppskotið at selja íbúðarbygningarnar hjá landssjúkrahúsinum. Hetta tykist løgið, tí tað høvdu vit eisini í uppskotinum hjá farnu samgongu, men tá tosaði serliga javnaðarflokkurin harðliga ímóti. Teir søgdu eisini, at upphæddin, ið tá var ásett fyri bygningarnar var alt ov høg, men í hesum fíggjarlógaruppskotinum er upphæddin júst tann sama, sum hon var í okkara, greiðir Jenis av Rana frá.

### Fegnast um økta menningarhjálp

Ein játtan á fíggjarlógaruppskotinum, sum er nógv vaksin í mun til undanfarin ár, er menningarhjálpin, og tað er Jenis av Rana sera fegin um. – Játtanin til menningarhjálp er farin úr 300.000 krónum upp í tríggjar milliónir, og tað haldi eg er sera gleðiligt, hóast upphæddin enn er ov lítil. Nú ræður bert um, at tað fer at bera til hjá ymiskum felagsskapum at fáa hendur á hesum pengum, tí tað hevur verið ein trupulleiki orsaka av sera strongum krøvum til hesar felagsskapir frá landsstýrinum, sigur formaðurin í Miðflokkinum.

Jenis av Rana sigur seg tó verða eitt sindur bangnan um ein tendens, ið eftir hansara tykki er at síggja sum ein reyður tráður gjøgnum alt fíggjarlógaruppskotið. – Nógvar smáar játtanir eru skerdar munandi. Til dømis eru Javni, Sinnisbati, MBF, Blái Krossur og Deyvahúsið skorin við 10 prosentum. Hetta eru smáar upphæddir, ið talan er um, og tær gera sera lítlan mun í landskassanum, men stóran mun hjá hesum felagsskapum, ið heldur áttu at fingið eina tøkk fyri tað sjálvbodna arbeiði, ið tey gera, sigur Jenis av Rana.

Formaðurin í Miðflokkinum sigur eisini, at hann heldur ikki skilir sparingarnar í miðfyrisitingini, og hann saknar grundgevingar fyri hesar sparingar frá landsstýrinum.

# Ikki nøktandi við stórum undirskoti

**Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, er ikki glaður fyri, at fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrissamgonguni annað árið á rað hevur eitt undirskot á umleið 200 milliónir krónur**

FÍGGJARLÓGARUPPSKOTIÐ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Kári P. Højgaard sigur, at hann enn ikki hevur havt stundir til at hyggja nærri at fíggjarlógaruppskotinum, men samanumtikið er eitt undirskot upp á 200 milliónir krónur ikki nøktandi, og sjálvsstýrisformaðurin heldur, at tað fer at verða tungt at fáa hesar pengarnar innaftur.

### Skattalættin rakar ikki rætt

Sambært Kára P. Højgaard segði sjálvsstýrisflokkurin undan løgtingsvalinum í vetur, at tað neyvan fór at verða pláss fyri skattalætta á komandi fíggjarlóg. – Eg haldi, at tað virkar púra øvugt, at man ger pláss fyri skattalætta á einari fíggjarlóg, sum hevur eitt trý-siffrað milliónahall, sigur hann.

– Føroyska samfelagið tolir ikki fleiri ár á henda hátt, hóast fíggjarstøðan í landinum er góð, sigur sjálvstýrisformaðurin.

– Somuleiðis eri eg bangin fyri, at skattalættin ikki fer at raka tey røttu, t.v.s. tey lágløntu, sum javnaðarflokkurin annars sigur seg umboða, og tað er harmiligt, sigur Kári P. Højgaard.

– Eg haldi, at samgongan átti heldur at hugt upp á avgjaldspolitikkin. Nú hava teir fylgt ætlanunum hjá okkum í fyrrverandi samgongu viðvíkjandi heilsuavgjaldsuppskotinum, har avgjald verður lagt á ymiskar vørur, ið ikki eru til frama fyri heilsuna. Gott nú hava teir ikki lagt avgjald á grønakeks, men annars líkist uppskotið ómetaliga nógv tí hjá undanfarnu samgongu, sum javnaðurflokkurin, ið tá sat í andstøðu, hevði hug til at gera til láturs, sigur Kári P. Højgaard. Formaðurin í sjálvsstýrisflokkinum heldur skemtandi fyri, at kanska hevði tað verið rætt at spurt samgonguna, um teir høvdu biðið Karsten Hansen og Bill Justinussen, ið vóru faddrar at uppskotinum hjá gomlu samgongu, um copyright av heilsuavgjaldsuppskotinum.

Kári P. Højgaard hevur annars ikki hug til at gera tær heilt stóru viðmerkingarnar enn til fíggjarlógaruppskotið, tí at hann ikki enn hevur havt stundir til at nærlesa uppskotið.



*Kári P. Højgaard, formaður í Sjálvstýrisflokkinum, er als ikki glaður fyri, at landsstýrið hevur gjørt eitt fíggjarlógaruppskot, ið vísir slakar 200 milliónir í halli.*
*Savnsmynd*